# Brøðurnir á Hálsi



*Poul Færø er ein av teimum, sum nógvu tey seinnu árini hevur verið millum teir, sum ofta hava verið at hoyrt á samfelagsstevnuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hóast einki serligt veður, so var skarðin stórur og serliga stórur sunnudagin, tá ið brøðrasamkomurnar um vikuskiftið høvdu árligu samfelagsstevnuna í Havnini**

BRØÐRASAMFELAG
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað svitast ikki. Hvørt ár fyrrapartin av november hava brøðrasamkomurnar í Føroyum samfelagsstevnu í Havnini. Stevnan hesa ferð var síðsta vikuskifti. Tað var samkoman í Ebenezer, sum var vertur, og mong fólk úr brøðrasamkomum kring landið og eisini mong onnur vóru á samkomunum. Veðrið var einki serligt í vikuskiftinum, men hóast koyrilíkindini ikki vóru nakað serlig í vikuskiftinum, so tóktist hetta ikki vera orsøk til, at fólk settust aftur. Serliga sunnudagin var fjøldin rættuliga stór.

Mikukvøldið, hósdagin og inntil seinnapartin fríggjadagin vóru samkomur í Ebenezer. Fríggjakvøldið, leygardagin og sunnudagin varð hildið til í ítróttarhøllini á Hálsi.



Brøðurnir hava ávísa skipan, sum teir leggja skránna eftir. Fyrrapartar og seinnapartar nevna teir fundirnar uppbyggingarfundir, um kvøldarnar er tað, teir nevna evangeliskir fundir, og uppaftur seinni um kvøldið er opið hús, sum teir nevna samkomurnar, ið serliga eru ætlaðar teimum ungu.

Stílurin í talu, sangi og tónleiki er eitt sindur ymiskur frá tí eina slagnum av samkomum og til hinar. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið vóru nógv hundrað ungfólk í høllini. Har varð sungið nógv, og tónleikurin var nógvur og fjølbroyttur. Onkur hevði ein boðskap, og so varð drekkamuður bjóðaður. Millum sangkreftirnar var sangbólkurin Salt úr Eysturoynni, sum fríggjadagin í hesi vikuni fer at geva fløgu út.

Í vikuskiftinum var stórt felags kór við umleið 120 sangarum. Tað var samansett av sangarum úr Eysturoy (Siloakórið), úr Havnini (Ebenezerkórið) og úr felagskóri úr Suðuroy. Eisini sungu Sangbrøður, sum vóru nógv at hoyra fyri einum tredivu árum síðani, og sum fyri einum ári síðani góvu fløgu út.

Millum røðararnar vóru nakrir av mongu trúboðarunum, sum arbeiða út frá brøðrasamkomuni: Zacharias Zachariassen, Símun í Túni, Poul Færø, Øssur Berghamar, Svenning av Lofti og Jógvan Zachariassen.

Møtið, sum var hildið leygarkvøldið klokkan 8, varð tikið upp til sjónvarpið, og møtið, sum varð hildið sunnukvøldið kl. 7, varð sent í útvarpinum. Seinnu árini hevur tað verið siður, at nátturði er bjóðaður øllum, sum eru í høllini. Soleiðis var eisini hesa ferð, og enn eina ferð sást, at tað var væl lagt til rættis.

Brøðrasamkomurnar hava eisini samfelagsfundir á hvítusunnu og páskum. Á páskum verður samfelagsstevna á Skálafjørðinum og í Suðuroy, og á hvítusunnu verður samfelagsstevna í Klaksvík.






